“Youth Alive” vi› grei›um bo›skapi

Sunnukvøldi›, kl 20.45 í Ítróttarhøllini í Runavík, fingu vit sum áhoyrar á fyrsta sinni høvi› at hoyra Avstralska ungdómsbólkin “Youth Alive” framføra sang og tónleik á sera høgum stø›i.

Ta› er altí› spennandi at hoyra naka› n‡tt, so hetta kvøldi› var avgørt ikki naka› vónbrot í so máta.

Eini 700 - 800 fólk vóru samla›, tey flestu av teimum ung fólk, sum komu ymsa sta›ni frá bæ›i í landinum og innan samkomur.

“Youth Alive” bólkurin var› sera væl móttikin, har tey settu í gongd beinanvegin vi› blanda›um, heimagjørdum tilfari. Stílurin var blanda›ur vi› “skitnum” Rocki og Praise and Worship.

Tónleikurin var gó›ur og væl hjálptur av forsangarum, sum sungu sera væl. Ta› sum eg haldi ver›a eitt sindur spell var, at ein hoyrdi ikki or›ini sum vór›u sungin. Um ta› var ljó›góskan ella eitthvørt anna› skal eg ikki fara at loypa út í or›, tí var ta› sera gott at tey høvdu skipa› fyri at hava uppvørpu, solei›is at fólki› kundi fylgja vi› í tí, i› sungi› var› um. Innímillum kom ein dama upp á pallin, me›an sungi› var, har hon líkasum st‡rdi bólkinum og dugdi hon ógvuliga væl at fáa fólki› vi› sær.

Ta› er onki at ivast í, at bo›skapurin hjá teimum var sera einfaldur og

grei›ur. “LIVIR TÚ FYRI JESUS ? “. Í hesi gó›u atmosferuni tosa›i Christin Kain til fólki›, og eftir at hon hev›i tosa› eina løtu, ba› hon fólki› um at seta seg ni›ur. Hon greiddi frá, at Gud vil brúka okkum øll í hansara tænastu. Christin var sum smágenta sjálv missn‡tt í fleiri ár av ymsum monnum, men Gud vildi naka› anna›, tí Gud umbroytti hennara lív og lærdi hana at fyrigeva. Í dag kann Gud brúka Christin í sínari tænastu, “Youth Alive” fer›ast runt ver›ina í tænastu fyri Jesus í dag.

Christin tosa›i í eini 40 min. men ta› kendis bert sum ein løta.

Ja ella nei, var ta›, sum Christin Kain var upptikin av. At geva Jesusi alt, var ta› sum hev›i t‡dning.

Bjó›a› var til forbøn eftir hetta og ta› vóru fleiri sum tóku av til frelsu og endurn‡ggjan.

Samanumtiki› kann sigast, at ta› kendist sum ein blanding av konsert og møti, i› vit upplivdu hetta kvøldi›. At hesin sangstílur og framførsla annars er naka›, i› vit framyvir kunnu fáa bjó›a›, er líti› at ivast í, tí hóast n‡tt, so er kanska ikki so nógv “n‡tt” vi› gle›ibo›skapinum um Jesus, tí tann gamla søgan er jú sum kunnugt altí› n‡ggj.

Fyrireikararnir skulu hava tøkk fyri eitt vælskipa› kvøld.

Hans Fró›i Hansen

Fara at krevja endurgjald fyri yvirmenninar á Brimli

Ta› gongur av skri›uni at fáa ta› n‡ggja vaktar- og bjargingarskipi›, Brimil, heim til Føroyar. Hesar seinastu dagarnar eru ongar ábendingar komnar um, at òsemjan er vi› at linka›, tvørturímóti.

- Ta›, sum fíggjarmálast‡ri› ger, er ólógligt og ta› fara vit at krevja endurgjald fyri, sigur forma›urin í Skipara- og navigatørfelagnum

BRIMIL
Áki Bertholdsen

Ósemjan um n‡ggja vaktar- og bjargingarskipi›, Brimil, stendur vi› og versnar.

Hesar seinastu dagarnar hevur onki samband, sum kundi fingi› gli› aftur á máli›, veri› ímillum feløgini hjá teimum, sum skulu manna Brimilin og Fíggjarmálast‡ri›.

Einasta samband, sum hevur veri› ímillum partarnar hevur tvørturímóti ført vi› sær, at ósemjan bara her›ist.

Seinasta, sum Fíggjarmálast‡ri› tók var í farnu viku og ta› var at ste›ga lønini hjá yvirmonnunum, sum skuldi sigla vi› Brimli. -Tá i› teir ikki vilja arbei›a, kunnu teir heldur ikki fáa løn, seg›i Karsten Hansen, fíggjarmálará›harri.

Men forma›urin í Skipara- og Navigatørfelagnum, Ellintur Abrahamsen, sigur, at hetta hevur Fíggjarmálast‡ri› ikki rætt til.

-Hetta er ólógligt og ta› lata vit ikki fara aftur vi› bor›inum óátala›, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann sigur, at t a› er onki at ivast í, at Skipara- og Navigatørfelagi› fer at krevja endurgjald frá Fíggjarmálast‡rinum fyri at hava ste›ga› lønini.

- Menninir hava ikki nokta› at gera ta› arbei›i›, teir eru vanir at gera. Men ta› er beinlei›is ólógligt at loysa eitt skip frá bryggju, fyrrenn sáttmáli er ímillum rei›aran og manningina. Og eina løgtingssamtykt kunnu vit heilt einfalt ikki bróta, sigur forma›urin í Skipara- og Navigatørfelagnum.

-Vit bí›a bara. So ver›ur spennandi at vita, hvussu leingi Landsst‡ri› ætlar sær at bí›a, men ta› er so teirra avger›, leggur hann afturat.

ítróttur

Nr. 209 • t‡sdagur • 31. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Lotte og Ioana á føroyska landsli›i›

Onkur vil kanska hyggja spyrjandi at yvirskriftini, men sambært lógum ÍSF’s kann hetta gerast veruleiki

HONDBÓLTSLANDSLI‹
Jákup Mørk

Ta› er ikki bara á Christiansborg og í Landsst‡rinum, at spurningur ver›ur reistur um, hvat ein føroyingur í veruleikanum er.

Spurningurin er so sanniliga aktuellur, tá føroyingar skulu umbo›a land okkara í ítróttahøpi, tí hvør hevur rætt at vera vi› á teimum li›um, sum fara uttanlands.

Útlendskir føroyingar

Mest aktuelt í hesum sambandi eru hondbóltslandsli› okkara, sum í næstum skulu royna seg altjó›a høpi. Her hava landsli›svenjararnir bá›ir fyri langari tí› sí›ani tiki› út ein bruttohóp, sum bert er samansettur av í›kandi, sum vit vanliga rokna sum føroysk ítróttafólk.

Røddir hava tó av og á veri› frammi um, hvørt ta› ikki er gjørligt at styrkja um hópin vi› ø›rum nøvnum.

Ta›, sum hevur veri› mest umrøtt í hesum sambandi er møguleikin fyri at finna leikarar vi› føroyskum tilkn‡ti uttanlands, sum so kundu fingi› loyvi at umbo›a Føroyar. Ein møguleiki í hesum sambandi hev›i veri› Anja Byrial Hansen, sum er væl kend frá donsku jarngentunum. Beiggi hennara, Johan, er nú komin á føroyska A-landsli›i› í fótbólti, og einki er til hindurs fyri, at Anja kann gera eins og beiggin, og umbo›a Føroyar. Hetta tí ta› í hondbólti ikki er naka› krav, at um tú fyrst hevur umbo›a› eitt land í altjó›a høpi, so ert tú bundin at hesum framyvir.

Umframt væl kenda fyrrverandi donsku hondbóltskvinnuna, eru ivaleyst hópatals av ø›tum leikarum, sum á einhvønn hátt hava ættarbond í Føroyum. Ættarbond, sum kundu vi›ført, at vi›komandi kundi spælt á einum føroyskum landsli›i.

Føroyskir útlendingar

Ein annar møguleiki, sum sjáldan hevur veri› nevndur, er hvørt ta› er gjørligt at n‡ta teir útlendingar, sum longu eru í Føroyum á einum føroyskum landsli›i.

HSF hevur ongar reglur fyri, hvussu farast skal fram í slíkum sambandi, men tá sersambondini ikki hava grei›ar reglur fyri hesum, eru reglurnar hjá ÍSF galdandi.

Undir pettinum, Ymiskar ásetanir, í lógunum hjá ÍSF stendur: »Á føroyskum landsli›um kunnu bert føroyingar luttaka. Sum føroyingur ver›ur eisini rokna› útlendingur, i› hevur veri› fast búsitandi í Føroyum í minsta lagi 2 – tvey – ár, hevur virki sítt her og hevur føroyskan ríkisborgararætt.

Hetta merkir, at í prinsippinum kunnu teir útlendsku leikarar, sum hava búleikast í Føroyum tey bæ›i seinastu árini, vera vi› á einum føroyskum hondbóltslandsli›i›. Teir útlendsku leikarar, sum lúka hesar treytir, eru Lotte Sørensen, Ioana Rapa, Jacob Jónsson og Daniel Rapa, hóast hesin seinasti nevndi vegna ska›a neyvan er aktuellur í løtuni.

Hinvegin er eingin ivi um, at hini tr‡ høvdu veri› gó›ur fongur hjá einum føroyskum landsli›i. Tey teljast millum bestu leikararnar í landinum, og eitt nú hava bæ›i Lotte Sørensen og Daniel Rapa veri› kosin til bestu leikarar í føroysku kappingini, me›an ioana Rápa tvey ár á ra› hevur veri› besti málskjúttin í kvinnudeildini.

Í øllum førum átti ikki at veri› trupult hjá Lotte Sørensen ella Jacob Jonsson at skift ríkisborgararætt sín, um hetta ikki longu er gjørt, me›an ta› hinvegin kanska er ein longri prosess hjá teimum bá›um nevndu rumenunum.

Í hesum fullveldistí›um er ta› so allarhelst eisini ein spurningur, hvørt nakar yvirhøvur kann rópa seg føroyskan ríkisborgara, men hetta skal so ikki ver›a tikin stø›a til á hesum sí›um.

Skal metast eftir lógunum hjá ÍSF, er møguleiki fyri, at Ioana Rapa kann spæla á føroyska kvinnulandsli›num í hondbólti

Hev›i ikki gjørt ta› verri

Hóast hann ásannar, at ta› kundi styrkt um li›i›, heldur venjarin hjá kvinnulandsli›num, at vit eiga at gera okkum greitt, hvat vit vilja vi› einum landsli›i

HONDBÓLTSLANDSLI‹
Jákup Mørk

- Ta› hev›i so avgjørt ikki gjørt stø›una verri, um hasin møguleikin hev›i veri› til sta›ar.

Or›ini eigur venjarin hjá kvinnulandsli›inum, Sophus Dal-Christiansen, tá vit spurdu hann, um hann hev›i gjørt n‡tslu av t.d. Lotte Sørensen og Ioana Rapa, um hetta hev›i veri› gjørligt.

Mugu vita hvat vit ætla

Spurningurin má í øllum førum metast sum aktuellur, nú ta› tykist, sum um reglurnar hjá ÍSF geva rúmd fyri, at hesar kunndu leika á einum føroyskum landsli›i›, treyta› av føroyskum ríkisborgararætti.

Skemtiliga tekur Sophus til, at eisini á hesum økinum ger ididentitetsloysi seg galdandi, so hann heldur, at ta› má vera í andanum av fullveldissamrá›ingunum, at hetta nú má kannast.

- Vit hava á›ur tosa› um, hvønn møguleika vit hava at fáa útlendska leikarar vi› føroyskum ættarbondum at spæla vi› landsli›num, og har eru ivaleyst fleiri evni. Spurningurin er tó eisini, hvat vit vilja vi› einum føroyskum landsli›i. Um talan skal vera um eitt landsli›, sum er sett saman av føroyskum leikarum, ella um vit skulu seta eitt so sterkt landsli› sum gjørligt saman, sigur Sophus.

- A›rasta›ni er hetta púra vanligt, og eitt nú hevur Eysturríki eitt kvinnulandsli›, har eingin eysturríkari er á. Eisini hjá spanska manslandsli›num og kvinnulandsli›num hjá Australiga kemur hetta fyri.

Neyvan her og nú

Sum nevnt, so heldur Sophus altso, at ta› fyrst og fremst ræ›ur um at gera sær greitt, hvat man vil vi› einum landsli›i.

- Hinvegin er einki at ivast í, at hetta kundi styrkt um verandi kvinnulandsli›. Breiddin í hópinum hev›i eisini veri› størri, og hetta hev›i aftur vi›ført økta kapping.

Hóast hann sostatt ikki tykist at útiloka nøkrum sum helst í hesum sambandi, so leggur Sophus at enda afturat, at hetta neyvan er aktuelt her og nú.

- Nú er somiki› skjótt, at fyrstu altjó›a uppgávurnar standa fyri framman, so neyvan ver›a stundir til at avgrei›a naka› til ta tí›



Sophus Dal-Christiansen